VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 17. juni 2014
J.Nr.: 13/00118-127
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: JPH

**Útboð**
**grannskoðan**
**av**
**partafelagnum P/F Visit Faroe Islands**

Vísandi til løgtingsmál nr. 143/2013, samtykti løgtingið 8. mai 2014 at umskipa Ferðaráð Føroya til P/F Visit Faroe Islands. Í hesum sambandi bjóðar Vinnumálaráðið út grannskoðanina av felagnum.

Av tí at grannskoðarin skal veljast á stovnandi aðalfundinum hjá P/F Visit Faroe Islands, skal útbjóðingin vera avgreidd, áðrenn stovnandi aðalfundin hjá felagnum. Virksemið hjá partafelagnum, sum skal stovnast at reka P/F Visit Faroe Islands, er væl lýst í løgtinsmáli 143/2013.

**Krøv til tilboðið**
Tilboðið skal fevna um hesar upplýsingar:

- Granskoðarin skal vera løggildur.
- Navn og skrásetingarnummar hjá grannskoðanarfyritøkuni umframt eina almenna lýsing av førleikunum hjá grannskoðanarfyritøkuni og royndir hennara.
- Nøvn og CV hjá teimum lyklapersónum, sum grannskoðanarfyritøkan knýtir at grannskoðanaruppgávuni.
- Dømi um viðkomandi kundar og uppgávur, sum lyklapersónarnir hava loyst, har Vinnumálaráðið fær heimild at venda sær til hesar kundar fyri at fáa møguligt ummæli av lyklapersónunum.
- Kostnaðin fyri árligu grannskoðanina av partafelagnum, og tímaprís fyri aðrar uppgávur, sum møguliga kunnu koma afturat árligu grannskoðanini.

**Vekting av tilboðum**
Prísurin vektar 80 % og góðska, sum m.a. eru førleikar og royndir hjá lyklapersónunum, vekta 20 %.

**Spurningar og freistir**
Útboðið er kunngjørt á Keypsportalinum (www.keypsportal.fo) mikudagin tann 18. juni 2014. Tilboðsgevarar kunnu seta spurningar um útboðið til og við týsdagin tann 24. juni 2014, kl. 16:00. Spurningarnir skulu vera skrivligir og sendast Jóhan Paula Helgason á johanph@vmr.fo. Spurningarnir verða síðan viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi mikudagin tann 25. juni 2014. Tilboðini frá tilboðsgevarunum skulu verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi *fríggjadagin tann 27. juni 2014, kl. 12:00*. Vinnarin av útboðnum verður almannakunngjørdur á Keypsportalinum týsdagin tann 1. juli 2014.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 60 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO